## Ymiskar kanningar

Sunnudagin er val í Týsklandi, men hóast meiningakanningarnar upp undir valið eru fleiri, er u úrslitini sum ymisk, at tað er ilt at gera sær eina mynd av, hvussu endin verður. Tvær av teimum seinastu kanningunum vísa, at Angela Merkel væntandi fer at skipa stjórn saman við Fríu Demokratunum (FDP). Teir flokkarnir fáa eftir kanningini 48 prosent. Men sambært einari aðrari kannign er tað mest líkt til, at Sosialdemokratarnir fara at skipa stjórn saman við Teimum Grønu og sosialista-flokkinum Die Linke. Hendan kanningin gevur hesum trimum flokkunum 49 prosent.



## Vilja hava danska hjálp

Níggju norðurkoreanar komu í morgun inn á donsku sendistovuna í vietnamesiska høvuðsstaðnum Hanoi og bóðu um danska hjálp, so tey kundu sleppa frá at fara aftur til Norðurkorea. Danski sendiharrin í Vietnam, Peter Hansen, váttaði fyrrapartin, at nakrir norðurkoreanar vóru á sendistovuni, men hann vildi ikki siga, hvørji ørindi tey høvdu har. Danskir fjølmiðlar gita, at norðurkoreanarnir vilja hava hjálp frá dønum til at flyta til eitt annað land í Asia. Tað sama hendi í 2007, tá Danmark hjálpti nøkrum norðurkoreanum, sum vildu sleppa til Suðurkorea at búseta seg. Tað sluppu teir.

# ya Tele um hjálp




*SHEFA-2 kaðalin millum Føroyar og Skotland kemur uppá land í Hetlandi. Nú skal brúk gerast av honum. Oljuvinnan brúkar sum er kaðalin*

arbeitt við at leggja eina ætlan fyri hesa menning.

Í fyrsta umfari verður brúk fyri ráðgeving og øðrum KT tænastum og verður hetta gjørt í tøttum samstarvi millum Føroya Tele, Shetland Island Council og helst eisini BT, sum helst sær tað sum eina skilagóða loysn, at eitt felag á tí støðd sum Føroya Tele hevur kann átaka sær umrøddu uppgávu. BT er júst farið undir at nútímansgera fjarskiftiskervið í Bretlandi. Byrjað verður í London og Manchester fyri síðani um kanska fleiri ár at enda í Hetlandi og hinum oyggjunum.

### Føroya Tele rætta felagið

-Hetta hava vit als ikki tíð til at bíða eftir og eftir at hava fylgt gongdini í Føroyum og sæð, hvussu dugnaligir tit hava verið á hesum øki hevur landspartating okkara gjørt av at heita á Føroya Tele um at loysa upp fyri hesi fyri okkum so týðandi uppgávu sigur Marvin Smith.

-Eg eri komin til Føroya fyri at kanna, um føroyingar eru áhugaðir í at hjálpa okkum at byggja út eitt undirstøðukervi. Talan er jú um oyggjasamfeløg, sum liggja fjarskotin frá meginlandinum og sum vit hava skilt, so hava tit megnað at útbyggja eitt sera framkomið fjarskiftiskervi, og vit halda avgjørt, at vit hava nakað at læra av tykkum. Tit hava nakað at lata okkum, sum kann tryggja, at okkara oyggjasamfelag ikki verður heilt afturútsiglt í mun til eitt nú restina av Bretlandi.

Marvin sigur víðari, at í nógvum førum er Hetland frammanfyri onnur útjaðaraøki í Bretland, men skal Hetland, sum liggur fjarskotið, kunna fylgja við menningini, so er neyðugt at menna fjarskiftiskervið, ikki minst nú internet og breiðband eru vorðin ein so týðandi partur av lívinum hjá fólki í dag. Skulu vit varðveita arbeiðsplássini og fáa fólk at støðast í Hetlandi, so má KT tøknin og fjarsamskifti verða partur av menningini. Sum er standa vit langt aftanfyri býarumhvørvini í Bretlandi. Tí vilja vit nú gera alt fyri fáa gagn av fiburkaðalmenningini, og vit eru í teirri hepnu støðu, at SHEFA-2 longu hevur gjørt landgongd.

Marvin Smith heldur tað vera ein stórur fyrimunur fyri teir at kunna samstarva við eina meðalstóra fjarskiftisfyritøku sum Føroya Tele, tí kommandovegirnir eru nógv skjótari. -BT er so mikið stórt, at tú hevur ilt við at koma á tal við teir, meðan vit bara kunnu taka telefonina og ringja til Føroya Tele og tosa út um tingini - og so hendir nakað.




# Føroya Tele hyggur út í heim

**Íløgan í SHEFA-2 varð gjørd fyri uppá sikt at tryggja Føroyum eitt gott fjarskiftissamband. Men kaðalin er eisini at meta sum ein lopfjøl út á aðrar marknaðin, eitt nú oljuvinnuna og oyggjasamfeløgini út fyri Skotland.**

NÝGGIR MARKNAÐIR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Hjá Føroya Tele síggja tey tørvin hjá hetlendingum á fjarskiftisøkinum sum ein góðan og upplagdan møguleika at koma út um landoddarnar við vørum og tænastum. Tá oljuboripallar vestan fyri Hetland í fjør vórðu knýttir upp í SHEFA-2 brúkti Sosialurin m.a. yvirskriftina: "SHEFA-2 leggur gullegg". Hóast hann altíð er varin og ikki tekur munnin ov fullan, so dylur tann fryntligi og professionelli leiðarin á FT Net, Páll Vesturbúð ikki fyri, at myndamálið við gulleggunum er júst tað, sum Føroya Tele hevur havt í kvittanum, tá henda stóra íløga varð gjørd. Fyrst og fremst er hon gjørd fyri at tryggja Føroyum gott samband. Harnæst kemur øll hjáveiðan. Og har er tað so ein sannroynd, at risastórar fyritøkur í oljuvinnuni longu hava bitið á. Nú verður so farið eitt stig víðari. Í land í Hetlandi. Føroya Tele kemur inn í myndina sum ráðgevi og veitari umvegis SHEFA-2.

- Føroya Tele sær Hetland sum ein nýggjan marknað, har felagið kann arbeiða í framtíðini. Eg ivist heldur ikki í, at ein KT risi sum British Telecom sær positivt uppá, at eitt felag sum Føroya Tele kemur inn á marknaðinum og kann vera við til at loysa nakrar av teimum uppgávum, sum liggja fyri framman.

Páll Vesturbúð vísir á, at Føroya Tele hevur í eina tíð samstarvað við Shetland Island Council í sambandi við Shefakaðalin, sum fer í land í Hetlandi, uttan tó at tann møguleikin hevur verið troyttur í Hetlandi enn.

-Hetta er so ein nýggjur marknaður fyri okkum. Í fyrsta umfari er ætlanin at kanna møguleikarnar og vita, hvat skal gerast fyri at lata upp fyri kaðalinum.

Sjálvandi ynskja vit at selja meira kapasitet her. Men hetta er eisini ein marknaður, har BT stendur sera sterkt. Tað er tí eisini umráðandi fyri hetlendingar, at okkara virksemi har ikki hevur við sær, at BT gevst við at gera íløgur har í framtíðini.

### Kaðal til Lervick

Arbeitt verður nú við at kanna, hvussu sambandið kann flytast inn móti Lervickøkinum. Tað verður so fyrst og fremst okkara vitan innan fjarskifti, sum vit fara at bjóða teimum.

Íløgurnar verða í fyrsta umfari gjørdar av hetlendingum sjálvum. Shefakaðalin fer uppá land í Hetlandi til eina kaðalstøð har, men í dag er einki samband millum hana og restina av verandi infrakervi.

Páll Vesturbúð sigur víðari, at hetta væl kann útvikla seg til nakað stórt og serstakliga um hetta eisini verður gjørt í samstarvi við BT. Hetta er tað sum Føroya Tele helst vil.

Støðan í dag er tann, at Hetland hevur eitt rættiliga stórt útboð av tænastum, men man hevur ikki tað infrakervi, sum kann bera allar hesar tænastur út til kundarnar.

Føroya Tele fylgir eisini væl gongdini á olju- og gassleiðunum vestan fyri Hetland. –Har eru nýggj øki, sum verða latin upp fyri boringum komandi árini. Vit hyggja tí eisini eftir møguleikum.

Shefakaðalin, sum fer á land í bæði Hetlandi og Orknoyggjum, kann í framtíðini eisini koma væl við hjá oljuvinnuni í landi. Her finnast stórir oljuterminalar, sum taka ímóti olju og gassi frá leiðunum vestan fyri Hetland.

Páll Vesturbúð vísir á, SHEFA-2 kaðalin var ein neyðug íløga uppá sikt fyri at tryggja altjóða sambandið hjá Føroyum. Og Shefa er ein íløga, sum skal vara nógv ár fram og sum er tung at lyfta. Føroya Tele roynir tí eisini at fáa inntøkur av Shefa á øðrum marknaðum og her er tann hetlendski ein av hesum nýggju marknaðum.